# Savnsrøktin er prinsippmál, ikki pengamál

**– Tá ið landsmyndugleikarnir leggja út við at siga, at lands- og kommunaluppgávur skulu haldast hvør sær, ber ikki til samstundis at fløkja viðurskiftini sum við semjuni um savnsrøktina, sigur Finnleif Guttesen, borgarstjóri í Tvøroyrar kommunu, ið enn stendur fast við avgerðina um ikki at rinda fyri savnsrøktina**



*– Skilji væl, at lærarin krevur samsýning fyri at røkja søvnini, men vit eru sannførd um, at hetta er ein landsuppgáva, tá ið landið eigur lærar-arnar, sigur Finnleif Guttesen, borgarstjóri í Tvøroyrar kommunu*

SAVNSRØKTIN
*Turið Kjølbro*

Hóast semja varð undirskrivað í farnu viku um savnsrøktina og serstovur og amboð, sum nógvir hundrað næmingar brúka, aftur eru komin undir kønar hendur, er síðsta orðið ikki sagt enn í hesum málinum. Eina kommunan, Tvøroyrar kommunu, sum er limur í Kommunusamskipan Føroya, tvíheldur eins og Føroya Kommunufelag framvegis um prinsippið, at landið skal rinda fyri savnsrøktina í fólkaskúlanum. Kommunan fylgir sostatt ikki hinum stóru kommununum, sum eru gingnar við til at rinda fyri helmingin av tí, savnsrøktin kostar.

– Vit sleppa okkum als ikki undan ábyrgdini, sum forkvinnan í Føroya Lærarafelag vil vera við. Men vit halda fast við prinsippið sum er, at landið eigur ikki at blanda uppgávurnar millum land og kommunur samstundis, sum tað roynir at fáa greiðar linjur millum hesi. Tað er ikki upphæddin, sum savnsrøktin kostar, sum vit hefta okkum við, men sjálvt prinsippið at halda viðurskiftini atskilt, sigur Finnleif Guttesen, borgarstjóri í Tvøroyrar kommunu.

Meðan savnsrøktin hevur verið á skránni farnu mánaðirnar, hevur Føroya Lærarafelag ført fram, at tað heldur seg til eitt álit, sum varð skrivað um málið fyri tveimum árum síðani, og sum avvarðandi myndugleikar vóru við til at skriva. Eisini Kommunusamskipanin. Men sambært Finnleifi Guttesen er gingið burtur frá tilmælunum, sum álitið legði upp til, nevniliga, at kommunurnar eiga at rinda fyri savnsrøktina alla sum hon er.

– Landsmyndugleikarnir kunnu ikki ynskja greiðar linjur millum land og kommunu, samstundis sum teir eru við til at fløkja tær. Í mínum hugaheimi er loysnin einføld og hon er, at landið ber allar útreiðslurnar av savnsrøktini.

Spurdur um tað ikki hevði verið skilagott at víkt frá hesum, tá ið landið er gingið við til at gjalda fyri helmingin av tí, savnsrøktin kostar, sigur Finnleif Guttesen, at tað ber ikki til út frá prinsippinum.

– Skilji væl, at lærarin krevur samsýning fyri at røkja søvnini, men vit eru sannførd um, at hetta er ein landsuppgáva, tá ið landið eigur lærararnar. At áleggja kommununum uppgávur uttan at pengarnir fylgja við, er ikki rætt, og hetta er ikki einasta dømið, sigur Finnleif Guttesen, sum sostatt hellir til sjónarmiðið hjá Føroya Kommunufelag, sum tvíheldur um tað sama.

Hvussu støðan er á skúlanum á Tvøroyri, hava vit ikki fingið innlit í, men sambært Finnleifi Guttesen er støðan ikki so ring.

– Eg fari at kanna, hvussu vit fáa serstovurnar at virka aftur, møguliga at bjóða handverkara uppgávuna. At røkja serstovurnar er í grundini ikki ein lærarauppgáva sum so. Málið skal í øllum førum loysast so ella so í næstu framtíð.

## Samráðingar um KT-økið

**Fyrsti samráðingarfundurin í hesum umfarinum um KT-økið innan fólkaskúlan var í gjár**

KT-ØKIÐ
*Turið Kjølbro*

Samráðingarnar um KT-økið innan fólkaskúlan millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið eru byrjaðar.

Fyri tveimum vikum lýsti Føroya Lærarafelag við eini yvirlýsing, sum sigur, at verður eingin avtala um KT-økið í fólkaskúlanum gjørd innan stutta tíð, noktar Føroya Lærarafelag limum sínum at arbeiða sum KT-vørðir frá komandi skúlaári. Síðani álitið er skrivað um økið, hevur Fíggjarmálastýrið gjørt greitt, at landið bert rindar fyri námsfrøðiliga partin á KT-økinum.

Føroya Lærarafelag hevur sóknast eftir starvslýsing fyri KT-vørðarnar síðani kunningartøkni kom inn um skúlagátt, og at fáa samsýningarnar til KT-vørðarnar uppá pláss. Hóast fleiri áheitanir eru hesi viðurskifti ikki fingið uppá pláss enn, tó so seint sum í farnu viku fekk Føroya Lærarafelag starvslýsing sendandi. Sambært landsstýrismanninum í skúlamálum er grundin til trupulleikarnar á økinum, at semjan frá 30. apríl 2000 viðvíkjandi savnsrøkt og KT-vørðum ikki verður tulkað eins frá avvarðandi pørtum. Bæði álitini eru skrivað sambært semjuni, men einki stendur í semjuni um, hvat síðan skal fara fram.

Forkvinnan í Føroya Lærarafelag, Elsa Birgitta P. Petersen, hevur góðar vónir um, at semja fæst, soleiðis, at KT-økið kemur uppá pláss, áðrenn næsta skúlaár byrjar.

– Eg ivist ikki í, at tað skulu ikki nógvir samráðingarfundir til, áðrenn málið verður loyst, sigur hon.

Einir 20 lærarar eru útbúnir sum KT-vørðar. Hesi árini hava teir arbeitt eftir eini fyribilsavtalu um røkt av KT.

## Jens Pauli á týskum

ÚTGÁVA
*Turið Kjølbro*

Í dag 22. mai handar Norbert Vogt frá Týska-føroyska vinafelagnum »Tjaldur« Jens Paula Heinesen, rithøvundi, týsku týðingina av »Nú ert tú mansbarn á foldum«, sum júst er útkomin við heitinum »Ein Kind hier auf Erden«. Hetta er fyrstu ferð, at ein skaldsøga, týdd beinleiðis úr føroyskum, kemur út í Týsklandi. Otmar Werner, sáli, týddi við stórum nærlagni. Vinafelagið hevur greitt handritið til prentingar, útgevari er Ulrich Meysenburg.

## Sinnisbati heldur føðingardag

**Fríggjadagin í vikuni, 24. mai, hevur Sinnisbati 20 ár á baki, og í hesum sambandi verður hátíðarhald í Norðurlandahúsinum**

SINNISBATI
*Turið Kjølbro*

Føðingardagurin hjá Sinnisbata verður hildin í Norðurlandahúsinum leygardagin. Byrjað verður kl. 14. Í hesum sambandi fær felagið vitjan úr Íslandi. Haðani kemur Heðinn Unnsteinsson, sálarfrøðingur, sum er leiðari fyri »verkætlanini til sálarliga heilsu« í Íslandi. Heðinn er fyrrverandi tunglyndissjúklingur, sum hevur kent trupulleikarnar í egnum lívi. Seinni fór hann so at lesa til sálarfrøðing í Amerika. Hann vísir nú øðrum á møguleikar at koma úr sinniskreppum, samstundis sum hann vísir ljósmyndir og greiðir frá um evnið »Sálarlig heilsa, lívsgleði og lívseydna.«

Saman við Heðinni kemur eisini fysioterapeuturin Ebba Ásmundsdóttir, sum hevur verið við í verkætlanini hjá Heðinni. Hon fer at hugleiða um sálarliga heilsu.

Undir tiltakinum syngja og spæla Lena og Niclas.

Um kvøldið verður døgverði á Hotel Hafnia fyri innbodnum, har nevndarlimirnir seinastu 20 árini verða við, saman við øðrum gestum.

### Sjón fyri søgn

Tað var á vári í 1982, at nøkur fólk tóku stig til at fara undir fyrireikingar til stovnan av einum áhugafelagi fyri sálarsjúk fólk. Á stovnandi fundinum vórðu hesi vald í fyrstu nevndina í Sinnisbata. Arni Ludvig, Katrin Dahl, Berlina Hentze, John Smith og Karin Margretha Joensen-Næs.

At stovnanin av Sinnisbata fyri 20 árum síðani hevur havt sín týdning, prógvar virkna arbeiði felagsins øll árini síðani við úrslitum, ið ganga sjón fyri søgn.

Sinnisbati er í dag eitt felag, ið allir føroyingar viðurkenna, sum felagið, ið umboðar tey sinnisveiku og sjúku. Somuleiðis hava myndugleikar landsins viðurkent Sinnisbata, bæði í tí at teir taka felagið í fullum álvara og taka tað við í ráðleggingini av framtíðarviðurskiftum teirra sálarsjúku og í tí at teir hava sett Sinnisbata í fíggjarløgtingslógina.

### Nevnd og útlit

Nevndin í Sinnisbata, sum varð vald á aðalfundi 12. mai, er Svenning av Lofti, sum er formaður, Margreta Poulsen, næstformaður, Arnfinn Poulsen, kassameistari, Tummas Thomassen, skrivari, Ásla Svensson, nevndarlimur, Maria Andersen, eykalimur, Sólbjørg Petersen, eykalimur og Soffi Egholm, eykalimur.

Í nýggjastu ársfrágreiðingini hjá felagnum verður sagt, at ár 2000 fer í søguna, sum tað árið, tá ið fíggjarnevnd løgtingsins metti tað vera rætt at felagið Sinnisbati varð sett á fíggjarløgtingslógina við einum stuðli á 200.000 kr. Felagið tekur hetta sum eina viðurkenning frá samfelagnum av arbeiði felagsins fyri teim psykisk sjúku og at felagið fær høvi at gera eitt enn betri arbeiði til frama fyri hesar samfelagsborgararnar, sum felagið varð stovnað fyri at hjálpa.

Fleiri enn 400 limir eru nú í Sinnisbata og limatalið økist í hvørjum.

## Fyrilestur um Joseph Beuys

**Í kvøld heldur svenski listafrøðingurin Gøran Vogel-Rodin fyrilestur í Listaskálanum um týska listamannin Joseph Beuys**

FYRILESTUR

Hóskvøldið 23. mai kl. 19 heldur svenski listafrøðingurin Gøran Vogel-Rodin fyrilestur í Listaskálanum um gitna týska listamannin og hugspekingin Joseph Beuys og tað víðkaða listahugtakið. Sama kvøldið greiðir Vogel-Rodin frá installasjón síni í Listaskálanum: Camera Obscura – Projection, undir heitinum Landslagið, medvitið og málið.

Joseph Beuys varð borin í heim í Krefeld í Týsklandi í 1921, og doyði í 1986. Í 1941-45 var hann týskur jagaraflogskipari. Síðani 1961 var hann professari við listaakademiini í Wien og Dusseldorf. Fáur hevur sum Beuys verið við til at broyta vesturlendsla fatan av, hvat list er - hann var ein undangongumaður til Fluxus-rørsluna (sum eitt nú Bjørn Nørgaard, ið júst hevur havt framsýning í Listaskálanum, er runnin av). Fyri Beuys snúi tað seg um at náa fram til eitt nýtt støði fyri listini og listafólkinum og harvið menniskjanum og menniskjans støðu í samfelagnum.



# Í mesta lagi fýra ár

**Talan kann í mesta lagi gerast um fýra ára fongsulsrevsing til tann ákærda í narkomálinum. Ákærumyndugleikarnir hava ikki biðið um nevningating, og tískil kann ikki talan ikki gerast um hægri straf enn í mesta lagi fýra ár**



*Hassj verður ikki dømt líka strangt sum amfetamin og kokain.*

RÆTTARMÁL
*Heri á Rógvi*

Tann 36 ára gamli maðurin, ið hesar dagar er í rættinum í sambandi við stóru og umfatandi ákæruna ímóti sær í tí nógv umrødda narkomálinum – størsta málið í Føroya søgu av sínum slag.

Hóast ákæran er stór og umfatandi, so kann tað »í mesta lagi« gerast talan um eina fýra ára langa fongsulsrevsing, um hann verður funnin sekur.

Tað er ákærumyndugleikin, sum hevur avgjørt hetta. Vanligt er ikki, at ákærumyndugleikin roynir at fáa hægri revsingar, enn hann metir grundarlag er fyri. Tað framgongur í retsplejeloven, at tað í mesta lagi kann gerast talan um fýra ára straf við rættarmál, har nevnating er.

– Ved retten på Færøerne behandles i første instans de sager, i hvilke nævninger medvirker.

Stk. 2. Nævninger medvirker i:

sager, hvori der bliver spørgsmål om straf af fængsel i 4 år eller derover, for så vidt dette ikke er en følge af, at der bliver spørgsmål om fastsættelse af en fællesstraf efter reglerne i straffelovens §§ 40, stk. 1, og 61, stendur at lesa í paragraf 687í rættargangslógini.

### Javnstillað

Tann ákærdi, ið talan er um, er ákærdur fyri at hava staðið fyri innflutningi og sølu av bæði hassj, kokain og amfetamin. Tey bæði seinnu evnini eru serstakliga vandamikil evni, og geva hesi oftani rættiliga langa fongsulsrevsing. Í Danmark gevur kokain vanliga harðari revsing enn amfetamin, men í Føroyum verða hesi bæði vandamiklu evnini javnsett.

Rigsadvokaten hevur orðað rundskriv, har mælt verður til harðar revsingar í sambandi við mál við tílíkum dusandi evnum.

Tað ber tó ikki til at rokna út, hvussu stórur ein møguligur dómur kann gerast, tí tað er eingin regla fyri, hvussu nógvar dagar í fongsli eitt gram gevur. Tað eru einans orðaðar vegleiðandi reglur fyri hesum, men tað eru nógv fleiri ting, ið kunnu spæla inn í einum møguligum dómi.

Tað hevur eisini týdning, hvønn leiklut tann ákærdi hevur havt. At smugla rúsevnini er tað, ið gevur harðast straf. Tað er so eisini munur á, um tú hevur smuglað fyri tey sjálvandi ella »einans« verið eitt nú strámaður fyri onkran annan.

Nevnast kann, at smuglan av 117 g av kokain kann geva fongsulsrevsing í eitt ár. Í hesum umtalaða málinum verða eini 145 g av kokain nevnd í ákæruritinum, har tað mesta verður nevnt í sambandi við sølu.

Verður tann ákærdi dømdur fyri teir nøgdir, ið standa í ákæruritinum, so er eingin ivi um, at straffurin verður harður og verður tætt við tey fýra árini, men tað eru sum sagt nógvar umstøður, ið kunnu ávirka støðuna.

Stóra narkomálið:

# Umfatandi ákæra reist

**Fútin hevur reist eina ákæru, ið umfatar 33. punkt, í sambandi við brot á lógina um euforiserende stoffer. Talan er um størsta ákæruna av sínum slag nakrantíð í Føroyum, har samlaða nøgdin á hassj er 26 kg.**

RÆTTARMÁL
*Heri á Rógvi*

Nógv umtalaða narkomálið byrjaði mikumorgunin mest avgerandi og kanska eisini síðsta kapittul. Málið hevur verið hildið koyrandi síðani í januar mánað, tá løgreglan eftir umfatandi húsarannsóknir og drúgt arbeiði handtók eina røð av persónum í tí, ið seinni skuldi vísa seg at gerast størsta málið av sínum slag í Føroyum.

Maðurin, sum av fyrsta tíð varð nevndur í øllum skuldsetingunum og verður sagdur at vera ein av bakmonnunum, er nú komin fyri rættin. Málið er síðani byrjan vorðið meira umfevnandi og fleiri persónar eru eisini komnir fyri rættin og eru dømdir.

### 1.450.000

Málið er rættiliga umfatandi. Ákæran umfatar 33 punkt, har tey 32 snúgva seg um dusandi evni. Tað eina snýr seg um eina hóttan. Ein hópur av persónum er nevndur í ákærunin, og nógvir av hesum hava eisini verið fyri rættinum, og onkur er eisini dømdur.

Ákærumyndugleikin hevur ikki biðið um nakran ávísan straf, men hann hevur hinvegin nevnt eina peningaupphædd, ið ákærin heldur, at tann ákærdi hevur vunnið sær av rúsevnasølu í Føroyum. Talan er um 1.450.000 kr., ið ákærumyndugleikin ynskir at fáa hendur á.

Í alt er talan um ákærur viðvíkjandi 26 kg. av hassj, 145 g kokain og 43 g amfetamin.

Rættarmálið heldur fram nakrar dagar.



*Tann høvuðsákærdi í stóra narkomálinum.*
*Mynd: Jonhard Hammer.*

# Charlotta vara fyri Jenis

**Charlotta á Váli varð við lutakasti vald til varamann fyri Jenis av Rana á Føroya Løgtingi**

VAL
*Heri á Rógvi*



*Charlotta á Váli Olsen kann nú kalla seg varakvinna á tingi fyri Jenis av Rana. Hetta varð avgjørt við lutakasti.*

**Tórshavn:** Miðflokkurin fekk ein løgtingslim valdan á ting á valinum 30. apríl. Hesin gjørdist eins og við undanfarna val Jenis av Rana, ið varð valdur í Suðurstreymoyar valdømi. Jenis fekk 298 persónligar atkvøður, og Miðflokkurin fekk tilsamans 601 atkvøður í Suðurstreymoy, sum er ein lítil helvt av samlaða atkvøðutalinum hjá Miðflokkinum.

Á øðrum plássi hjá Miðflokkinum í Suðurstreymoy stóð á jøvnum. Tey bæði, Charlotta á Váli Olsen og Jónfinn Olsen, fingu bæði 47 atkvøður. Tískil skuldi lutakast til fyri at gera av, hvør av teimum skal gerast varamaður hjá Jenisi. Tey valstýrið fyri Suðurstreymoy, ið tekur lut.

Lutakastið hevur verið, og valið fall á Charlottu á Váli. Hon skal sostatt taka sæti á tingi fyri Jenis av Rana, tá hann ikki kann vera tilstaðar.

Seinastu fýra árini er tað meira enn so komið fyri, at Jenis hevur verið burturstaddur, og varamaðurin hevur tikið sætið ístaðin.

Charlotta á Váli Olsen er 47 ára gamul og ættað úr Klaksvík. Hon er útbúgvin pedagogur og starvast til dagligt sum leiðari á frítíðarskúla.

ALLAR
ENTREPRENØR MASKINUR…

REPRO-Z · 319540
Alt innan nýtt og brúkt
KOMATSU í Føroyum
sp/f KBI
Postbox 354 · FO-700 Klaksvík · Faroe Islands
Mobile: +298 214406 · Phone: +298 458606 · FAX +298 458706